www.sosialurin.fo

# TRAPPUTINGIÐ

## – GONGUR Á ODDA Í KJAKINUM

Fríggjakvøldið 9. februar kl. 20:00 skipar Miðlahúsið fyri Trapputingi



Har fólk hittast!

# ORKA, UMHVØRVI OG FRAMTÍÐIN

## – ERU FØROYAR PARTUR AV ALTJÓÐA SAMFELAGNUM Í HESUM HØPI?

### VIÐ PALLBORÐIÐ SITA

- **Sigurð í Jákupsstovu,** stjóri á Jarðfeingi
- **Bogi Hansen,** professari í havumhvørvi
- **Klæmint Weihe,** stjóri í SEV
- **Jákup Sólstein,** stjóri í Reiðarafelagnum
- **Bergmann Finnsson,** Agenda21 ráðgevi

Luttakararnir fáa 10 minuttir í part til framløgu. Síðani er orðið frítt.

**Orðstýrari:** Uni Arge

Miðlahúsið bjóðar kaffi og smákøkur

ØLL ERU VÆLKOMIN

### miðlahúsið

Miðlahúsið hevur nú í skjótt tvey ár verið karmur um sonevnda Trapputingið, har endamálið er at taka upp týðandi mál, sum eru uppi í tíðini. Her kann talan vera um mál, sum hava verið ella fara at verða viðgjørd í Løgtinginum, men eisini um mál, ið annars upptaka fólk.

Á Trapputinginum sleppa fakfólk og leikfólk at siga sína hugsan um aktuell evni, og vón okkara er, at hetta fær týdning fyri málið framyvir. Eitt nú undir viðgerðini og orðaskiftinum á Løgtingi, soleiðis at vit og tit geva tingfólkum eitt betri grundarlag at taka støðu út frá.

Vit stuðla fría orðinum og stimbra demokratiska orðaskiftinum millum fólk í Føroyum.

miðlahúsið í Vágsbotni